# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Hjólini aftur at mala á Kósini

Hóast mong myrk skíggj, komandi og farandi, so eru tíbetur eisini glottar at hóma, og ein teirra er ljós í endanum á Norðoyartunnilinum, Klaksvíkar megin. Alt bendir á, at ljós aftur verður tendrað á tí fyrr so stolta Kósavirkinum, og at hjólini aftur fara at mala. Eftir dvalatilveruna í eitt ár eru nú útlit til, at fremsta fiskvinnuplássið í landinum aftur kann sleppa at liva upp til sítt navn. Kósavirkið letur uppaftur um nakrar vikur og arbeiði verður aftur til nógvar norðingar.

Tað eru JFK og Føroyagrunnurin, sum saman við øðrum vinnulívsfyritøkum og vinnulívsfólki hava tikið stig til at lata Kósavirkið uppaftur. Sáttmáli varð í gjár undirskrivaður í Klaksvík millum keypararnar og seljaran, Føroya Banka. Keypsprísurin er 18 mill. Kr. Føroya Banki upplýsir, at tað hevur mist 12 mill. kr. uppá Kósavirkið, nú tað hevur selt virkið aftur.

Tað kom ómetaliga dátt við, tá hetta flaggskipið av fiskavirkjum í Føroyum bráddliga lat aftur í fjør. Tað kendist sum fór ein gjóstur gjøgnum alt samfelagið. Var hetta veruliga bert eitt byrjunartekin um, hvat fór at henda í øllum samfelagnum vóru tað mong, sum spurdu. Tíbetur hava flestu  av virkjunum hóðra undan tó at tað ger ilt nógvastaðni.

Vit hava nú øll bíðað eftir í spenningi, hvør fór at taka um endan aftur í Klaksvík og keypa virkið aftur frá bankanum. Nú eydnaðist tað so við góðum kreftum bæði í Klaksvík og aðrastaðni. Tað er eisini greitt, at eingin vøkstur verður, um tað ikki fáast synergiir og gott samskifti  millum virki og peningastovnar í hesum tíðum serstakliga. Vit hava sæð ta gongd, at peningastovnar eru vornir alt meira varnir at veita lán, nú teir missa nógv uppá, at virki og skip ikki klára seg og annars uppá niðurgangstíðirnar í samfelagnum sum heild. Tað royna vit sjálvandi at skilja, hinvegin steðgar alt upp, um ikki peningastovnarnir eisini spæla við. Um teir bara verlja at fara inn í seg sjálvar og tryggja seg, so manglar bráddliga eitt týðandi lið í samfelagsmenningini. Eru ikki nettupp bankarpakkarnir gjørdir til tess, at vinnuhjólini ikki skulu steðga upp. Vónandi er avtalan millum banka og nýggju fólkini aftanfyri Kósavirkið eitt tekin um, at fíggjarverðin og vinnan megna og vilja ganga hond í hond øllum samfelagnum  til gagns.

Í gjár umrøddu vit eina aðra sólskinssøgu, nevniliga hana, at Bakkafrost fekk heiðurslønina Ársins virki. Tað stimbrar og skapar áhuga fyri at halda fram og gera arbeiðið enn betur. At Kósavirkið letur uppaftur er enn ein sólskinssøga og vóna vit, at hon fer at hita væl ikki bert í fiskivinnuumhvørvinum í Klaksvík men í øllum samfelagnum. Góða eydnu.

**Sosialurin**

## Um eftirlønar (fólkapensiínina) og aðrar útreiðslur hjá tí almenna o.a.

**JENS PAULI Í DALI**
Leynar

Fyrst vil eg takka teimum, ið við sínum lesarabrøvum geva sítt íkast til samfelagskjakið. Summi hava ofta gjørt vart við síni sjónarmið, t.d. Símun Pauli Jacobsen, Heri Mohr, Palli Dalsgaard o.o. Flestu okkara eru meira jarðbundin í okkara skriving, summi skemtingarsom, men fáa tó síni sjónarmið fram, sum t.d. Aksel Krogh kundi gera.

Teir, sum stýra okkara landi í dag hugsa mest um at skerja allar útreiðslur til pensiónistar og onnur sum fáa almenna veiting.

Ongin nevnir nakað um nakrar inntøkur, ella at hesi fólk gjøgnum ár og dag hava verið tey, sum hava goldið skatt og onnur gjøld, at bygt hetta land og givið fólkið tær veitingar og stuðul, tey hava havt brúk fyri.

Í løgtingi og landsstýri tosa tey bara um, at tað verða so nógv fleiri fólk sum árini ganga, ongin nevnir nakað um, at tað verða fleiri inntøkur.

Ein av teimum veitingum, sum menn hava róst sær av er samhaldsfasti. Hvør er so tann sum fær mest úr honum - jú, tað er landskassin. Hetta havi eg onki ímóti, men hetta vísir, at tað almenna ikki bert hevur útreiðslur av teimum gomlu.

Meti at skattainntøkurnar av samhaldsfasta eru einar 3-4 mill. kr. um mánaðin ella u.l. 30-50 mill. um árið og verða enn størri sum egineftirlønirnar hækkað og verða fleiri. Hesin peningur verður í veruleikanum dupult skattaður.

Nevnast kann, at tey sum fáa sína egnu eftirløn, gjalda væl meira í skatti enn tey fáa úr landskassanum. Um eini 10-15 ár verður tað soleiðis, at flestu eftirløntu gjalda so mikið í skatti, at tey sjálvi figgja sína elliseftirløn (fólkapensión) og meir enn tað.

Reglugerðirnar fyri eftirlønir má tó vera soleiðis, at fólk ikki fáa útgoldið alla eftirlønina í einum.

Ein onnur inntøka hjá landskassanum er hon, at fleiri pengar fólk hava um hendi, fleiri inntøkur fær landskassin.

Onkur hevur havt uppskot at styrkja samhaldsfasta grunnin við at hækka inngjaldið við 1/4% í eini 4 ár. Hetta haldi eg er gott uppskot.

Haldi at tað almenna skuldi goldið eftirlønargjøld til ein eftirlønargrunn vegna tænastumenn, landsstýrisfólk og løgtingsfólk.

Annars haldi eg at seinast samtykti eftirlønarstigin hjá landsstýrisfólkum og løgtingslimum er tekin um ov stórt sjálvsøki og ov lítlan sjálvsaga. Flestu teirra hava 1-2 eftirlønir, aðrir 3-4 eftirlønir umframt aldurseftirløn (fólkapensión) og samhaldsfasta.

Seinast gjørdu broytingar í veitingunum til fólk er tekin um at tað er skeivt at avtaka sjúkrakassar. Heldur lagt teir saman og latið teir hildið áfram. Teir munnu fáa nógv meira úr pengunum enn tað almenna fær.

Longu áðrenn teir vóru avtiknir fingu fólk (pensiónistar) eitt eykagjald uppá 600 kr., umframt aðrar óhepnar broytingar fyri ávísar fólkabólkar. Skilið verður ikki frægari aftaná 1. januar 2010.

Ein av stóru inntøkunum hjá landskassanum var inntøkan frá Føroya Banka. Nú hevði hon gjørt góðan mun í tóma landskassan. Tað var rætt at einskilja tann fyrsta triðingin, men ein eigur ikki at einskilja meir av bankanum (posamatur er ofta ódrúgvur). Meti ikki at hann verður rikin betri, um hann allur verður privatur. Bæði í Føroyum og aðrastaðni hava vit ringar royndir av vánaligum bankavirksemi. Tá bankar fara á heysin ella hava fíggjarligar trupulleikar, er tað skattgjaldarin og viðskiftafólk, ið gjalda rokningina við t.d. skatti, hægri rentu, tænastugjøldum o.ø. Úrtøkan hjá partaeigarunum er sjálvdan tann stóra.

Um vit skulu hava ein sjálvberandi búskap, ræður um at vaksa um inntøkurnar. Hetta kann best gerast við at fáa meir úr tí tilfangi vit hava, vaksa framleiðsluna, finna nýggjar vørur, seta á stovn nýggj virkir, stuðla granksing og verkætlanir, t.d. innan orkisparing o.t. Til hetta krevst íløgur. Ein ella fleiri sterkar íløgugrunnar. Hetta kundi verið gjørt í 2002, tá menn skerdu blokkstuðulin. Høvdu teir tá sett peningin í ein íløgugrunn, høvdu teir í dag havt ein íløgugrunn við 2-3 milliardum kr., og kundu so skert blokkin, uttan at tað hevði havt serligan fíggjarliga ávirkan.

Ein annar háttur at fáa henda íløgugrunn er at seta komandi inntøkur úr Føroya Banka í ein grunn í nøkur ár. Vit hava nógv gott tilfangi (fólk) her og aðrastaðni, ið kundu verið við í hesum virksemi.

**Innsent tilfar**
Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.